Vikuskiftis Sosialurin


# FTZ keypt meirlutan í AMA og Esmar Simonsen




**Føroysku eykalutafyritøkurnar AMA í Havn og Esmar Simonsen á Kamsdali eru farnar í samstarv við FTZ Autodele & Værktøj A/S, sum er størsta heilsølan innan eykalutir til bilar í Danmark**

HANDIL

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Danska fyritøkan FTZ Autodele & Værktøj A/S hevur keypt meirilutan í bæði Sp/f AMA í Havn og eykalutadeildini hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali.

FTZ er størsta heilsølufyritøkan í Danmark innan eykalutir og amboð til bilar. Fyritøkan hevur 41 deildir í Danmark við meira enn 750 starvsfólkum. Árligi umsetningurin er yvir ein milliard krónur.

Stjórin á FTZ Autodele & Værktøj A/S, Michael Juul Hansen, sigur, at hann væntar at nýggja samstarvið fer at vera til gagn fyri bæði føroysku fyritøkurnar og kundarnar.

Í samrøðu við Bilradio á Rás2 siga Jákup Mikkelsen frá P/f Esmar Simonsen og Vagnur Johannesen frá AMA-billutir at teir vænta sær nógv av hesum nýggja samstarvinum. Serliga tí at teir kunnu hava størri vøruúrval og betri prísir til kundan. Ætlanin er eisini at útbyggja tænastuna við t.d. at koyra vørur út til kundar dagliga.

Starvsfólkini hjá báðum fyritøkunum hava nú møguleikan í samstarvi við FTZ at dagføra seg við øllum tí nýggjasta, sum kemur á marknaðin.

Jákup Mikkelsen sigur, at hjá P/F Esmar Simonsen er tað einans deildin, ið selur eykalutir til bilar sum er við í samstarvinum við FTZ. Teir selja eisini t.d. Still trukkar og Texaco olju, sum ikki er við í FTZ-samstarvinum.

Sáttmálin millum partarnar varð undirskrivaður hósdagin 30. oktober.

*Sáttmálin millum partarnar varð undirskrivaður hósdagin 30. oktober. Á myndini eru f.v.: Vagnur Johannesen, Menning Geyti, Ragnar P. Joensen frá Sp/f AMA, Jákup Mikkelsen frá P/F Esmar Simonsen, og Finn Egerholm og Michael Juul Hansen frá FTZ Autodele & Værktøj A/S*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

---

Fyri 30 árum síðan:

# Spreinging kostaði eitt mannalív





Stutt fyri middag tann 8. oktober 1978 hendi ein ógvuliga sterk spreinging í Havn, sum skakaði nærum øll hús í býnum og hoyrdist til nærmastu bygdirnar.

Spreingingin kom frá einum arbeisskúri ovarliga á Dalavegnum á eini trøð, sum var undir byggibúning. Í arbeiðsskúrinum vóru umleið 50 kilo av dynamitti og spreingiperlum, sum vóru atvoldin til spreingingina.

Ein 25 ára gamal maður lat lív, og stórur skaði hendi á húsini í grannalagnum, og nógvir rútar brotnaðu. Umleið 50 hús fingu størri og smærri skaðar.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1978*